# Stjóraskifti á Formula.fo



1. mars býta teir báðin Hákun Steingrímsson og Torkil Holm Petersen sess sum ávikavist stjóri og nevndarformaður í Formula.fo

**Stjórin og nevndarformaðurin á Formula.fo býta um sess. Torkil Holm Petersen, sum hevur verið við í fyritøkuni heilt frá byrjan, verður frá 1. mars at roknað nevndarformaður**

VAKTARSKRIFTI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í tíðindaskrivi verður sagt, at skiftið er sambært ynski frá Torkilli Holm Petersen, sum ynskir at brúka meiri av síni tíð til nýggja bygningin, sum felagið letur byggja á Boðaneshamri og til at menna útlendska partin av Formula, Formula International.

Nevndin hevur valt at gingið ynskinum hjá stjóranum á møti, og avgjørt at skeringsdagurin verður 1. mars. Eftir hendan dag verður Torkil Holm Petersen soleiðis nevndarformaður í Formula.fo og Hákun Steingrímsson stjóri.

Torkil Holm Petersen hevur verið stjóri í Formula.fo, síðani felagið varð stovnað. Felagið hevur nú í mong ár hat høvuðssæti í Stiðjagøtu í Havn. Men sum fyritøkan hevur ment seg til fremstu KT-fyritøku í landinum og hevur alt fleiri fólk í starvi, eru karmarnir vornir ov trongir. Formula.fo hevur tí gjørt av, at byggja ein nýggjan tíðarhóskandi bygning á Boðaneshamri.

Samstundis er skøtil settur á at altjóðagera Formula.fo. Felagið er, saman við Føroya Tele, Eik og TryggingarfelagnumFøroyar, drívmegin aftanfyri P/F Formula International, sum fyritøkurnar saman hava sett á stovn og reka. Torkil Holm Petersen er stjóri í Formula International og fær nú betri stundir til hetta arbeiðið.

Hákun Steingrímsson skal sum stjóri taka sær av dagliga rakstrinum á Formula.fo, og harumframt virka fyri at flætta arbeiðið á Formula.fo meira saman við virkisøkið hjá Føroya Tele og hjá Norriq.





ER DU HÅNDVÆRKER - OG HAR DU LYST TIL EN NY KARRIERE

**Væksten for Würth på Færøerne fortsætter, og derfor søger vi nu yderligere 2 sælgere til henholdsvis Byggeriet og Metal/Autobranchen.**

**Bygsælger**
Som sælger I byggebranchen skal du besøge tømrere, snedkere, murere, malere, entreprenører og andre træ- og byggeorienterede virksomheder.

**Metal/Autosælger**
Som sælger I Metal- /Autobranchen skal du besøge:
**Metal (70 %):** maskinfabrikker, smedevirksomheder, VVS firmaer, kølemontører, rørlæggere, blikkenslagere, ventilationsfirmaer, metalindustrier, interne værksteder, el-installatører mm.
**Auto (30%):** personbil-/lastvognsværksteder, karrosseriværksteder og autolakerere mm.

**For begge stillinger gælder det at:**
- Du er energisk, opsøgende og resultatorienteret
- Du er tillidsvækkende og kontaktskabende, hvilket gør dig i stand til at udvikle varige kunderelationer
- Det er en fordel, hvis du har en håndværkerbaggrund eller andet kendskab til branchen. Dette er dog ikke et krav; frem for alt skal du have lyst til at beskæftige dig med opsøgende salg.
- Vi forventer ikke du har en baggrund som sælger, da vi giver dig en grundig oplæring i salg.
- Du taler færøsk og dansk

**Hvad tilbyder vi:**
- En afvekslende og selvstændig hverdag i en professionel og vækstorienteret salgsorganisation inden for befæstelse, værktøj, kemiske produkter, personlige værnemidler, lagerkoncepter mv. til professionelle brugere i auto-, metal-, el- og byggebranchen.
- Grundig introduktion og oplæring
- En løbende teoretisk og praktisk uddannelse, hvor du hele tiden udvikler dig som sælger
- Fast løn med provisionsordning, bonusordning og pensionsordning.

Du er meget velkommen til at ringe til Würth Sælger Claus Christensen på telefon 225017 hvis du vil vide mere om jobbene.

Samtalerne vil foregå på dansk, da dit dansk sikkert er bedre end vores færøske!

Vi afholder samtalerne mandag den 3. og tirsdag den 4. marts 2008 i Tórshavn.

**Lyder det som dit nye job?**
- så klik ind på vores hjemmeside: www.wuerth.dk under "Job hos Würth", hvorfra du kan sende os din ansøgning elektronisk. Vi glæder os til at høre fra dig!

**Ansøgningsfrist: 26. februar 2008**
**www.wuerth.dk**

*Würth Danmark A/S er Danmarks største salgsorganisation og er markedsførende inden for salg af befæstelsesmaterialer og værktøj. Vi er flere end 500 dedikerede medarbejdere i Danmark og flere end 60.000 på verdensplan.*

12.02.2008- Byg og metal færøerne









# Volvo S40 til sølu

Sera væl hildin ikki-roykjara bilur. 1.8 bensin 125 hk. Árg. 10/2005, koyrt 25.000 km. Hevur ljós leðursetur, leður róður, leður gearknobb v/ alu, alu-panelir, el-spegl, orig. 17" alu-felgur, niðurbl. bakkspegl v/kumpass, klimaanlegg, innbygd barnasetur aftan o.m.a. Er sum nýggjur bæði innan og uttan.

Verður seldur, um hóskandi boð fæst

**Tel 21 19 96 ella kho@post.olivant.fo**